# burtur ímillum



*– Arbeiði við Føroysku Søgum hevur verið tað stuttligasta og mest spennandi arbeiði, eg nakrantíð hava havt, hóast tað samstundis hevur verið eitt tað strævnasta, ásannar Uni Leitisstein Hansen, ið hevur samskipað Føroyskar Søgur-verkætlanina fyri Eik og Substanz Nordisk Film*

*Mynd: Birgir Kruse*

## Langabbin lykilin

Tey vóru tó fá, ið upprunaliga gávu Una Leitisstein Hansen líkinda møguleika at fáa atgongd til stóra filmsskattinum hjá Jákup Andreasi Arge, fyrrverandi ursmiði, á Argjum, tá verkætlanin fór av bakkastokki í fjør.

– "Tað kunnu tit gott gloyma alt um," søgdu fólk við okkum. Nú skal eg ikki gera meg klókan upp á, hvat onnur hava gjørt ella sagt, tá tey hava spurt seg fyri, men tá Jákup Andreas Arge frætti, at pápi mín var ættaður av Nesi, og at eg var langabbasonur Tummas í Gerðinum, ja, so var einki óført. Tað vísti seg, at Jákup Andreas sum blaðungur hevði verið til skips saman við langabba og øðrum góðum monnum av Nesi og Toftum, og teir hava eftir øllum at døma tikið sær so væl av hesum óroynda unglingi, at hann tann dagin í dag bara hevur gott at bera hesum monnum. Tað kann eg í dag eisini fegnast yvir, at teir gjørdu, greiðir Uni Leitisstein Hansen frá, meðan eitt bros breiður seg um varrarnar.

– Grundleggjandi, so eri eg sera eyðmjúkur yvir tað álit, ið so nógv fólk hava víst mær, tá tey hava latið meg handfarið og valt burtur úr teirra privata filmstilfari. Eg eri eisini komin at kenna hópin av sera áhugaverdum fólkum, ið eg neyvan ikki hevði komið í samband við annars, og tað er ein stór gáva at fáa, er Uni Leitisstein Hansen skjótur at leggja afturat.

## Eitt Jobs tol

Samskiparin roynir ikki at skava útvir, at tað hevur verið hart arbeiði at gera næstu filmsfløguna lidna.

– Soleiðis er tað altíð móti endanum av einari kreativari prosess sum hesari. Tað verður altíð arbeitt til tað síðsta við at fínpussa og fáa alt so gott sum tilber. Í hesum umfarinum havi eg lagt allar søgurnar til rættis sjálvur, og eg má ásanna, at eg beint nú eri sera moyrur í heysinum av at jonglera við øllum handritunum, myndunum og faktaunum til tær 13 søgurnar, ið eru at finna á Føroyskar Søgur 2, staðfestir Uni Leitisstein Hansen erliga.

– Eg má rósa mínum samstarvsfelaga Helga Toftegaard, ið hevur sett Føroyskar Søgur 2 saman, tí tað er ótrúligt, at tað hevur hepnast honum at fingið so frægt sett saman burtur úr mínum mongu luftigu hugskotum og ógreiðu handritum. Og so hevur Helgi eitt Jobs tol, ið hevur verið sera kærkomið í arbeiðinum við at gera Føroyskar Søgur 2, leggur Uni Leitisstein Hansen læandi afturat.

## Onnur taka tráðin upp

Føroyskar Søgur 2 skilmarkar tó fyribils endan á virkna leiklutinum, sum Eik hevur havt í verkætlanini og varðveitsluni av føroyska filmsskattinum – ein leiklut, ið Føroyskar Søgur-filmsfløgurnar til alla tíð fara at bera vitnisburð um. Nú er tað upp til onnur at taka tráðin frá hesum risa átaki frá Eik Grunninum upp.

– Eik eigur heiður og æru fyri, at hann hevur verið sinnaður at stuðla hesari verkætlan so væl, sum hann hevur. Verkætlanin hevur eisini havt ætlaða árinið. Føroyskar Søgur hava virkað sum tø fyri føroyska filmsskattinum, ið hevur ligið deyður, men nú er vaktur til lívs. Fólk hava veruliga fingið eyguni upp fyri virði í gomlu filmsrullunum, hugleiðir Uni Leitisstein Hansen, samskipari.

Spurdur, um Føroyskar Søgur 2 eisini er endin á røðini av søguligum undirhaldi úr filmsskattinum, svarar Uni Leitisstein Hansen:

– Eg eri sera áhugaður at arbeiða víðari við tí rúgvusmikla filmstilfari, vit hava funnið fram í sambandi við Føroyskar Søgur. Tilfarið er sera umfatandi og eru tískil nógvir møguleikar í tí. Tað fyriliggur tó ikki nakað ítøkiligt beint nú, men vónandi býður okkurt seg. Eg fari komandi tíðina at kanna møguleikarnar fyri at fáa okkurt í lag, og vónandi er onkur sinnaður í at veita stuðul, so arbeiði við hesum tilfari kann halda fram. Men uttan mun til, hvat framtíðin hevur at bjóða, so hevur hetta verið tað stuttligasta og mest spennandi arbeiði, eg nakrantíð havi havt, hóast tað hevur verið strævið. Eg vóni inniliga, at føroyingar taka eins væl ímóti Føroyskum Søgum 2 og tey gjørdu við Føroyskum Søgum 1.



## FAKTA

Føroyskar Søgur 2 verða frumsýndar á móttøku í Miðlahúsinum í Vágsbotni mánadagin 27. juli kl. 15. Øll eru vælkomin.

Alla ólavsøkuna verður eisini høvi hjá teimum, ið støkka inn á gólvið í Miðlahúsinum, at síggja fyrstu filmskutini av Føroyskum Søgur 2.

www.foroyskarsogur.fo



*Tað er Helgi Toftegaard, ið hevur verið búsitandi í Danmark alt sítt vaksamannalív, sum hevur sett Føroyskar Søgur 2 saman. Her sæst Helgi í klippirúminum hjá Substanz á Nordisk Film umgirdur av bandasavninum*

*Mynd: Birgir Kruse*